# Fyribyrgjan og viðgerð av fólki við sálarbreki

**Hvussu kann rørsla stuðla undir viðgerðina av sálarliga sjúkum fólkum er evnið, sum verður tikið upp av Sinnisbati á temadegi í Norðurlandahúsinum mikudagin og á kjakfundi í Miðlahúsinum hóskvøldið**



TEMADAGUR OG KJAKFUNDUR

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Mikudagin 26. apríl skipar felagið Sinnisbati fyri stórum temadegi í Norðurlandahúsinum um evnið »Fysiskur aktivitetur – fyribyrgjan og viðgerð av fólki við sálarbreki«. Í hesum sambandi eru fleiri fyrilestrarhaldarar komnir úr Danmark. Teir eru Jan Svensson, sum er leiðari av ítóttarhúsinum fyri sálarliga sjúk í Keypmannahavnar kommunu og Aksel Graversen, sum er ítróttarsamskipari í ítróttarfelagnum »Kæmperne af 1998«.

Temadagurin byrjar klokkan 9 og endar kl. 15.30. Hann er í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Millum fyrilestrarevnini eru m.a. tey ráðini, sum Heilsustýrið hevur fyri rørslu tvs. fysiskum virksemi í sjúkrahúsverkinum, eisini nevnt »Modelindsats på psykiatriske afdelinger.« Síðani eru mong evni á skránni, sum fevna um »målrettet leg og idræt som en del af den psykiatriske behandling«.

Temadagurin er almennur men tú skal rinda fyri temadagin og er tilmelding á telefon 721236 ella 211016. Eisini ber til at senda teldupost sinnisbati@sinnisbati.fo.

Hóskvøldið 27. apríl verður so uppfylgjandi alment kjak í Miðlahúsinum í Vágsbotni um sama evni. Tann fundurin byrjar klokkan 19 og eru øll vælkomin.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 17 2006

# Nokia vísti góð úrslit

MARKNAÐARRÁK

Sum mett í seinasta marknarráki, hækkaði Nokia partabrævið enn meir. Nokia tók øll á bóli, tá tey hósdagin í farnu viku kunngjørdu ein góðan roknskap fyri fyrsta ársfjórðing. Sølan vaks meiri enn 15 mia. kr og úrslitið gjørdist 1,05 mia. kr., sum er 21% hægri enn árið frammanundan. Óvæntaða úrslitið fekk partabrævið at hækka gott 8% eftir kunngerðina. Kursurin varð 18,50, ið er tað hægsta síðan 2002. Góða úrslitið stavar serliga frá søluni í margmiðladeildini, ið hækkaði 55%. Sølan av fartelefonum vaks 30%, og tað var serliga sølan av 3G telefonini N70, ið gjørdi munin.

### Rentuhækkingin steðgað

Lánsbrævarentur hava staðið í stað hesa farnu vikuna. Danska 10-ára rentan liggur nú um 4,00%. Sovorðnir steðgir hava verið tvær ferðir áður í ár, og báðu ferð eru renturnar hækkaðar aftaná. Nú eru renturnar tó hækkaðar so mikið, at ein mótrørsla niður í rentu er væntandi.

### Partabrøv tálmað av høgum oljuprísi

Seinastu tíðina hava hækkandi olju- og ráværuprísir lagt alt størri trýst á partabrøv sum heild, meðan partabrøv tengd at olju- og ráværuvinnuni hava havt undanvind. Komandi vikurnar fara fleiri virkir at kunngera roknskap, og hesir fara væntandi at ávirka kursgongdina á partabrøvum sum heild. Hesa vikuna kunngera Microsoft og Siemens umframt norðurlendsku feløgini Norsk Hydro og Novo Nordisk roknskap.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna er væntandi, at høgi oljuprísurin og roknskaparkunngerðir fara at seta dagsskránna. Oljuprísurin tvífaldaðist í 2004-2005, uttan at inntøkurnar hjá virkjum sum heild vórðu tálmaðar nakað serligt. Nú verður áhugavert at vita, hvat marknaðurin heldur um ein oljuprís, sum liggur um 75 dollararnar fyri tunnuna.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 604,66 | -1,9% | ↓ |
| JPY | 5,19 | -0,4% | ↓ |
| GBP | 1.077,50 | 0,3% | ↑ |
| NOK | 95,08 | -0,1% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 100,62 | 0,0% | → |
| Evru Lánsbrøv | 167,80 | -0,1% | ↓ |
| Norrøn Partabr | 123,83 | 3,2% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 74,12 | -1,2% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*



Lesið Sosialin so eru tit við